## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Olivur Olsen farin

Fríggjadagin 21. januar 2005 andaðist Olivur Olsen í Klaksvík, 79 ára gamal.

Olivur var ættaður úr Svínoy, sonur Jógvan á Geilini og Elsebeth Malenu (Elsmalenu), sum var ættað úr bóndahúsinum Uppi í Húsi. Millum svínoyingar og mong onnur varð Olivur vanliga róptur Olivur á Geilini.

Teir vóru 4 brøður. Petur (Pedda) var elstur. Hann búði úti í Svínoy alla sína tíð. Næstur var Olivur. Síðani Esbern, sum fekk sær eftirnavnið á Geilini. Eisini hann búði úti í Svínoy. Yngstur er Jukim, sum býr í Havn.

Olivur vaks upp úti í Svínoy og livdi har sítt lív sum aðrir dreingir úti á bygd tá á døgum. Hann gekk í skúla, róði út og var við í arbeiði í bø og haga.

Ungur fór hann til Klaksvíkar at læra at smíða hjá mammubeiggjanum Heina í Svínoy. Eftir kríggið fór hann til Danmarkar á Tekniska skúla í Haslev.

Heimafturkomin arbeiddi hann nógv saman við Heina bæði í Klaksvík, í Havn og aðrastaðni.

Hann fór síðani til Íslands og arbeiddi har eina tíð. Hann var m.a. við til at smíða stólarnar í kirkjuni á Bessastøðum.

Í november 1959 giftist hann við Jóhannu (Lukk-Hannu), dóttir Malvinus í Vátutoft og Daniellu. Tey búsettust í barnaheimi hennara.

Í sjeyti-árunum fór hann at arbeiða hjá byggifelagnum Kanjon. Hetta var tá ein stór fyritøka, sum hevði stórarbeiði víða um í landinum. M.a. bygdu teir nógvar keiir.

Olivur hoyrdi til Brøðrasamkomuna og gjørdi nógv sjálvboðið arbeiði fyri hesa samkomu. Hann arbeiddi bæði á Zarepta í Vatnsoyrum og í barnalegunum í Grønlandi, har hann hjálpti til við at byggja ein pier.



Olivur skaddist illa í 87, tá hann var í Svínoy og bygdi eina høll. Datt niður úr einum stiga. Hann gavst tá at arbeiða lønandi arbeiði.

Lukk-Hanna og Olivur fingu dóttrina Ruth, sum er fødd 16. mars 1961. Hon er gift við Fróða Thomassen úr Svínoy, og tey eiga døturnar Jóhannu, sum er 12 ár, og Jenny, sum er 10 ár.

Olivur var fróðarmaður.

Havnar leksikon:

# Nøvn og ítróttarúrslit á ólavsøku 1938

Fyri nøkrum døgum síðan høvdu vit hesa myndina í blaðnum, ið er tikin á ólavsøku 1938 í Dr. Jacobsensgøtu í Havn, har vit heittu á tey, sum kendust við fólkini á myndini, um at koma við røttu nøvnunum og øðrum upplýsingum, ið vit nú hava fingið upp á pláss.

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja hesum viðvíkjandi, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 314647 / 273168.

Vit hava eisini fingið onnur ítróttarúrslit hesa ólavsøkuna:



*Fólkini á myndini eru, f.v.: Tummas Rubeksen, Viggo Lützen, Cornelius Reinert (á Fløtunum) Norðradalur, Símun Poulsen, Tummas Reinert (á Fløtunum), Norðradalur, Jóhs. Patursson, Kirkjubøur, Magnus Tórsheim, Leivur Hansen (Leivur hjá Trónda) og Mogens Lützen. Smágentan fremst á myndini er Hjørdis hjá Rosu (hjá Petur í Mattalág).*

### Kappróður

1. Havnarbáturin
2. Klaksvíkingur
3. Stangabáturin, Klaksvík

### Svimjing

Willy Rasmussen
Ásmundur Olsen, Kollafjørður

### Kappsvimjing

Harry Rubeksen og Finnur Helmsdal svumu kapp. Harry Rubeksen vann. Nicodemus Rasmussen, Julian Egholm og Ole Guttesen svumu kapp. Nicodemus Rasmussen vann.

Síðan svumu tvær gentur, tær vóru: Esther Petersen ár Bergen og Esther Zachariassen úr Hvalvík.

### Kappríðing

(menn)
1. Meinhardt Hansen
2. Jóhs. Olsen (Hvalvík)
3. Alex Samuelsen

(dreingir)
1. Viljormur Tórsheim

### Fótbóltur

Ólavsøkuaftan: HB-KÍ 5-1
Ólavsøkudag: B36-TB 0-1